# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Reyða kortið var ikki í lagi. Skotið hjá mær var sera vánaligt, tá eg rakti málverjan í høvdið, men hann flytur seg, og tí átti eg ikki at verið rikin av vølli*

*Finnur Hansson, StÍF*




*Vestmenningar hava enn munin, men kollfirðingar hava so sanniliga eisini vónina um, at teir kunnu spæla seg í steypafinaluna fyri fyrstu ferð í 20 ár*

*savnsmynd*

VÍF-KÍF 22-21 (11-10):

# VÍF vann akkurát

**VÍF dró longra stráðið, tá teir høvdu vitjan av KÍF í fyrru hálvfinaluni í Coca Cola-kappingini. Men finaluspurningurin er enn púra opin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyrru hálvfinalurnar í Coca Cola-kappingini hjá monnum vóru á skránni í gjárkvøldið, og í øðrum av dystunum tók oddaliðið í bestu mansdeildini, VÍF, ímóti grannunum úr Kollafirði.

Gongdin hjá VÍF hevur verið sera góð í landskappingini síðstu dystirnar. Teir hava vunnið síðstu 8 dystirnar, og tí vóru teir eisini mettir at vera favorittar í dystinum ímóti kollfirðingum.

Hjá KÍF hevur verið meir upp og niður í ár. Undan dystinum ímóti VÍF lógu teir á fjórða plássi, men síðstu dystirnar hava víst, at teir saktans kunnu koma longur upp eftir stigatalvuni. So spurningurin var, um KÍF fór at klára at steðga sigursrøðini hjá vestmenningum.

Sterkar verjur

Frá byrjan av var einki, sum bendi á, at VÍF fór at fáa ein lættan dyst ímóti gestunum úr Kollafirði. KÍF legði nevniliga betur fyri, og um miðjan hálvleik førdu teir við tveimum málum.

Hesa løtuna sóu áskoðararnir ikki nakað flott og polerað hondbóltsspæl. Hinvegin sóu teir verju- og málmansspæl á sera høgum støði, og bæði liðini høvdu stórar trupulleikar at spæla seg fram við verjuni hjá mótstøðuliðnum.

Sum hálvleikurin leið mannaði VÍF seg upp. Spælið fór at glíða betur í álopinum, og hetta gjørdi, at teir vunnu sær eina tvey mála leiðslu seint í fyrra hálvleiki. Hesa løtuna riggaði verjan eisini væl hjá vestmenningum, meðan KÍF slett ikki fekk sítt álop at koyra. Nú lá í luftini, at VÍF skuldi fara frá gestunum, men hetta vildi KÍF ikki loyva. Teir kempaðu seg innaftur í dystin, og teir fingu eisini samband, áðrenn farið varð til hálvleiks.

VÍF hevði munin

Seinni hálvleikurin byrjaði so at siga akkurát sum fyrri. Fyrstu løtuna hevði KÍF munin, og tá ið góðir 5 minuttir vóru farnir, høvdu teir lagt seg á odda, men so tók VÍF eitt sindur yvir. Næstu langu løtuna settu teir dagsskránna, meðan KÍF haltaði eitt sindur aftan á. Tó so, VÍF var ongantíð langt frammanfyri, og hvørja ferð teir løgdu seg á odda við einum ella tveimum málum, so bardi KÍF seg inn aftur í dystin. Trupulleikin hjá kollfirðingum var bara, at teir kláraðu ikki at leggja seg á odda. Hvørja ferð teir komu upp á javnleik, so fór VÍF fram um aftur.

Sum dysturin leið gjørdist greitt, at munurin fór at vera at kalla eingin millum liðini. Tá tríggir minuttir vóru eftir at spæla, megnaði KÍF enn tá at leggja seg á odda, men ikki gekk log tíð, so hevði VÍF svarða aftur, og tá dómarin bríksladi fyri síðstu ferð, høvdu vestmenningarnir vunnið – um enn tepurt.

Sjálvt um dysturin ikki var tann málríkasti, so var hann sera spennandi, og áskoðarnir blivu vitnir til ein intensan dyst, har verjurnar og málverjarnir vístu sera gott spæl. Munurin á liðunum var ikki stórur, og tí verður alt avgjørt mikudagin tann 24. januar, tá KÍF tekur ímóti VÍF í seinnu hálvfinaluni.

## FAKTA

**VÍF-KÍF 22-21 (11-10)**
**Málskjúttar:**
**VÍF:** Áki Olsen 6 (1), Agnar Joensen 5, Regin Joensen 4 (3), Sámal Joensen 3, Áki G. Olsen 2, Ingi Olsen 1, Harald Bjørgvin 1
**KÍF:** Damir Oros 9 (1), Gert Hansen 5, Daniel Rapa 4, Rógvi Weyhe 2, Karl Johan Djurhuus 1,
**Brotskøst:** VÍF 4, KÍF 4
**Útvísingar:** VÍF 2, KÍF 4
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen

## – Vit vóru ikki nóg klárir

Regin Joensen hjá VÍF var ikki heilt nøgdur við fyrru hálvfinaluna í Coca Cola-kappingini, sjálvt um teir vunnu á KÍF.

– Nei, vit vóru ikki heilt nøgdir við dystin. Vit fáa slett ikki bóltin at koyra í álopinum, og vit hava eisini stórar trupulleikar við at sleppa fram við verjuna hjá kollfirðingum. Verjan hjá okkum stóð hinvegin rættiliga væl, og serliga Eli stóð ein branndyst í málinum. Eg haldi sum heild, at vit vóru ikki nóg klárir til dystin í dag, og hetta var ikki júst útgangsstøðið, sum vit ætlaðu okkum undan seinna dystinum.

## – Vit mugu vinna seinna dystin

Eftir fyrru hálvfinaluna millum VÍF og KÍF fingu vit orðið á strikuspælaran hjá KÍF, Gert Hansen. Hann var sera væl nøgdur við verjuna henda dagin.

– Eg haldi, at vit kempa ótrúliga væl í dag. VÍF hevur stórar trupulleikar av okkara ágangandi verju, og henda partin av spælinum eru vit sera væl nøgdir við. Hinvegin fáa vit kanska ikki nóg nógv mál, men verjan og málverjin hjá VÍF spæla eisini ein góðan dyst, og teir gera tað trupult fyri okkum. Vit ætlaðu okkum at vinna dystin í dag, men skuldu vit tapa, so er fínt at tapa við einum málið. Nú mugu vit bara vinna seinna dystin í Kollafirði um tvær vikur.